## 0-28 í fýra landsdystum

Føroysku U-19 og U-17 kvinnulandsliðini taptu 0-6, 0-7, 0-7 og 0-8 ímóti Íslandi. Føroysku U-19 og U-17 kvinnulandsliðini máttu leggja rygg til fýra stórtap her í vikuskiftinum, tá tær spældu landsdyst ímóti íslendsku U-19 og U-17 landsliðunum í Klaksvík og í Fuglafirði. U-19 landsliðið tapti 0-6 og 0-7, meðan U-17 landsliðið tapti 0-8 og 0-7. Spurdur um hvat hann kann brúka hesi bæði stórtapini til, svarar venjarin hjá U-17 landsliðnum, Álvur Hansen: - Vónandi hava vit lært nakað av báðum dystunum. Vit spældu ímóti einum liði, sum er nógv sterkari enn okkara lið, bæði tá tað kemur til tað fótbóltsliga, kropsligt, venjingarstøðu, tekniskt og taktiskt. Tað er kortini týdningarmikið, at okkara leikarar spæla ímóti liðum, sum eru betri. Vit hava eisini leikarar sum eru góðir tekniskt, men sum ikki eru vanir við at spæla so harðar dystir innan so stutta tíð. So vit kunnu læra nógv av slíkum dystum, slær Álvur Hansen fast. Spurdur um nakrir glottar vóru at hóma í báðum dystunum, svarar Álvur Hansen: - Taka vit álopspartin, so komu vit í álopsstøður, og vit komu eisini til nakrar málmøguleikar. Vit fingu eisini fleiri innlegg, og eisini støður sum kundi blivið vandamiklar, men vit eru ikki nóg neyv í verjupartinum, og tí fóru lutfalsliga ov nógv mál inn. Eg haldi, at sjálvt um vit taptu 0-7 í dag, so var dysturin ikki so øðiliga einvegis, greiðir Álvur Hansen frá. Álvur Hansen staðfestir, at íslendskur kvinnufótbóltur er á høgum støði. Bæði U-19 landsliðið og A-landsliðið hava verið við til endaspøl, og tí var talan um klassamótstøðu.

# Landskappingin fer aftur í gongd

**VODAFONEDEILDIN** **Tríggir dystir eru í Vodafonedeildini í annaðkvøld, ein ólavsøkuaftan og ein ólavsøkudag, og harvið er summarsteðgurin í landskappingini av á hesum sinni.**

Hilmar Jan Hansen



**GRANNAUPPGERÐ**

*Millum teir fimm landskappingardystirnar, sum verða spældir í annaðkvøld og teir báðar ólavsøkudagarnar, er grannauppgerðin millum NSÍ og B68 í Runavík*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

Burtur sæð frá ÍF og AB, sum spældu 3. juli, hava øll hini liðini í Vodafonedeildini hildið summarsteðg frá landskappingini í ein mánað, men nú verður tørnað til aftur. Fýra av liðunum – HB, EB/Streymur, Víkingur og NSÍ – hava tó verið upptikin av europeiskum avbjóðingum henda farna mánaðin, so steðgur hevur verið lítil hjá teirra spælarum.

Dystirnir, ið nú verða spældir, eru teir í 16. landskappingarumfari, men annars hava flestu liðini spælt 14 dystir og ÍF og AB 15. Ikki fyrr enn um ein mánað er talið á spældum dystum aftur tað sama hjá øllum 10 liðunum í Vodafonedeildini.

Tríggir av dystunum í hesum umfarinum verða spældir í annaðkvøld, tá FC Suðuroy tekur ímóti ÍF í Vági, AB fær vitjan av EB/Streymi og NSÍ er vertur í grannauppgerð ímóti B68. So spælir HB heima ólavsøkuaftan ímóti B71, og ólavsøkudag tekur B36 ímóti Víkingi.

### Stór grannauppgerð

Ein hin mest áhugaverdi dysturin man vera grannauppgerðin í Runavík í annaðkvøld klokkan 18.30, har NSÍ tekur ímóti B68. Tá liðini møttust fyrru ferð í sjeynda umfari, gjørdi NSÍ bart á Toftum og vann 3-0. Hetta var samstundis triði sigurin á rað hjá runavíkingum av níggju, áðrenn teir síðst í apríl blivu steðgaðir við javnleiki ímóti AB.

Sum oddalið fer NSÍ óivað at leggja nógv fyri fyri at vinna, men hinvegin hevur B68 eisini brúk fyri stigunum, eftir at árið ikki er byrjað av tí besta, so helst verður talan um eina grannauppgerð, ið er minst so livandi og undirhaldandi, sum tær plaga at vera.

Á Vágseiði fær FC Suðuroy vitjan av ÍF, sum hevur havt eitt serstakliga gott kappingarár, tí liðið er í landskappingini á triðja plássi og hevur annars vunnið seg í steypafinaluna. Øðrvísi svangligt er tað hjá suðuroyingunum, ið enn bara hava vunnið tveir av teimum 14 undanfarnu dystunum, so skal tað venda hjá FC Suðuroy, fer tað skjótt at hava skund.

### Hátíðarhald á Argjum

Triði dysturin í annaðkvøld klokkan 18 er á spildurnýggja grasvøllinum á Argjum, ið alment verður tikin í nýtslu, so tí verður eitt sindur meira gjørt burturúr enn vanligt, nú EB/Streymur vitjar AB.

Hornorkestur spælir og Jógvan Arge, formaður í mentamálanevndini hjá Tórshavnar býráð, fer at halda røðu, áðrenn fyrsta sparkið á nýggja vøllinum verður, tá Heðin Mortensen, borgarstjóri, sparkar bóltin til Andrass Drangastein, formann í Argja Bóltfelag.

Nú AB fær nýggja undirlagið, er støðan ikki betur enn næstbest, tí AB liggur undir niðurflytingarstrikuni eftir eina serdeilis soltna fyrru kappingarhálvu, ið bert gav ein sigur, meðan felagið tapti líka ofta, sum tað vann: Sjey ferðir av hvørjum. Gestirnir úr EB/Streymi eru hinvegin á veg uppeftir og lúra bert eftir næsta møguleikanum at taka seg upp millum tey allarfremstu.

Dysturin á Argjum er kvøldið fyri ólavsøkuaftan, so tí verður hann taldur millum ólavsøkudystirnar í Havnini, sum hesa ferð eru ikki færri enn tríggir í tali. Samstundis eru hetta steypadystir, ið Tórshavnar kommuna hevur latið steyp til.

### Dystir á ólavsøku

Ólavsøkudag klokkan 18.30 spæla HB og B71 á ovara vølli í Gundadali. HB roynir at jagstra runavíkingar, so oddasessurin kann takast aftur, og óivað kann tað ávirka henda dystin, hvat hent er í dystinum í Runavík kvøldið fyri, um trýstið á HB er størri ella minni. Hinvegin er støðan hjá B71 heldur ikki so heilt galin, hóast liðið liggur niður ímóti »strikuni«, tí har eru trý stig niður til AB og FC Suðuroy, ið sandoyingar sjálvandi vilja gera alt fyri at hava niðan fyri seg.

Hin ólavsøkudysturin, sum verður í Gundadali ólavsøkudag, er millum tvey av liðunum í miðjuni á stigatalvuni, B36 og Víking. Bæði hava tað til felags, at ov nógvir dystir – seks í part – eru endaðir við javnleiki, so nú skal skjótt henda nakað, skulu liðini omanfyri ikki fara undan teimum. Vinnur B36 henda dystin, er støðan hjá Víkingi einki serlig, tí so verða seks stig til eitt pláss oman fyri miðjuna, men við sigri kann Víkingur hinvegin taka eitt týðandi fet ímóti betru hálvuni av stigatalvuni.

Nú farið verður í gongd aftur eftir summarsteðgin, leggur kappingarskráin nokk so harðliga út, tí longu sunnudagin og mánadagin eftir ólavsøku er aftur eitt fult umfar á skránni, og síðani koma ikki færri enn fýra umfør aftrat, so allan august fáa spælararnir á Vodafoneliðunum úr at gera.

*hilmarjan@sosialurin.fo*

**Føroyska Vodafonedeildin** vodafone | deildin

| NR. | LIÐ | DYSTIR | VUNNI | JAVNT | TAPT | + MÁL | - MÁL | +/- | STIG |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | NSÍ | 14 | 9 | 2 | 3 | 30 | 15 | +15 | 29 |
| 2 | HB | 14 | 8 | 4 | 2 | 28 | 18 | +10 | 28 |
| 3 | ÍF | 15 | 7 | 4 | 4 | 27 | 26 | +1 | 25 |
| 4 | EB/Streymur | 14 | 6 | 4 | 4 | 24 | 19 | +5 | 22 |
| 5 | B36 | 14 | 5 | 6 | 3 | 24 | 18 | +6 | 21 |
| 6 | Víkingur | 14 | 4 | 6 | 4 | 23 | 23 | 0 | 18 |
| 7 | B68 | 14 | 4 | 3 | 7 | 21 | 26 | -5 | 15 |
| 8 | B71 | 14 | 3 | 4 | 7 | 13 | 24 | -11 | 13 |
| 9 | AB | 15 | 1 | 7 | 7 | 18 | 28 | -10 | 10 |
| 10 | FC Suðuroy | 14 | 2 | 4 | 8 | 15 | 26 | -11 | 10 |